**Tekningina gjørdu vit í 2005, men veitst tú hvat? Tá teir fóru undir at byggja tann nýggja barnagarðin her á Eiði, gjørdist eg sera kløkk, tá eg sá, hvussu gekk við tí arbeiðinum. Tað vísti seg at barnagarðurin líktist rættiliga nógv okkara húsum**







# Eittans húsið

Tað vóru tær tíðir, tá hamarsløgini geltu nógvastaðni á Eiði, frá fólki sum vóru í ferð við at seta føtur undir egið borð. Hetta sást eisini aftur í fólkatalinum, sum tá tað var hægst lá uppi í 668 fólkum. Í dag búgva 612 fólk á Eiði.

Nú er hetta við húsabyggingini nærum vorðin ein rár hending, og í roynd og veru eru sethúsini hjá Helfrid og Helga einastu sethúsini sum eru í gerð í løtuni.

– Eg veit um aðrar ungar familjur sum fegnar vilja búseta seg her, men tað er nokk ikki so lætt at fáa lán til húsabygging beint nú.

– Í staðin velja nøkur teirra í tað heldur bíligaru loysnina at keypa eini sethús í bygdini, vísir Helfrid á.

**Hinvegin, so er tað ikki altíð plássið sum er avgerandi fyri, um fólk eru lukkulig. Men eg giti, at fyri okkum fer tað at gera gerandisdagin rúmligari**

## Úr balju í boblubað

*Tá hjúnini Helfrid og Helgi fóru undir at fyrireika sjálva byggingina høvdu tey ætlað, at arbeiðið fór at taka rímiliga tíð. Nú eru nakað yvir 4 ár gingin, og enn eru tey ikki flutt inn í dreymahúsini.*

*– Ja, tað hevur tikið heldur longur enn ætlað, staðfestir Helfrid. – Men nú er ferð komin á arbeiðið aftur.*

*Fyri gerandisdagin í familjuni fer hetta eisini at føra til stór framstig, nú dagurin nærkast tá tey kunnu flyta inn í 180 fermetrar stóru sethúsini. Børnini frøast í øllum førum um hetta.*

*– Í okkara lítlu húsum eru tey higartil farin í bað í eini balju, tí umstøður hava simpelthen ikki verið til annað. Nú kunnu tey ístaðin gleða seg til at sleppa í eitt boblubað, og haraftrat fáa hvør sítt kamar.*

*– Men hinvegin, so er tað ikki altíð plássið sum er avgerandi fyri, um fólk eru lukkulig. Men eg giti, at fyri okkum fer tað at gera gerandisdagin rúmligari – og, so behøvast vit heldur ikki at fara útum fyri at skifta meining. Nú kunnu vit saktans gera tað í einum og sama rúmi, sigur Helfrid við einum brosi.*